## DAGSINS MEINING

# Pressufrælsið

Talu- og skrivifrælsi, framsóknarfrælsið ella pressufrælsi, sum hugtakið eisini nevnist, er ein av grundstuðlunum undir vesturlendsku fólkaræðinum. Meðan einaveldið var, var pressufrælsið bannað og fólk, sum talaðu ella teknaðu atfinnandi móti kirkju ella kongi vórðu revsað. Hetta er ein orsøkin til, at pressufrælsið er sett í sjálva grundlógina í einum hvørjum fólkaræði. Tað er hetta frælsið, sum alt rokið um Muhammedstekningarnar í Jyllandsposten snýr seg um. Uttan mun til hvørjar grundir Jyllandsposten hevði til at seta nevndu tekningar í blaðið, so kann danska stjórnin ikki fara inn og sensurera pressuna. Um ein persónur, eitt felag, ella eitt trúarsamfelag kennir sær gingið ov nær, eigur tann fornermaði at fara til dómstólarnar og ikki til stjórnina.

Tað er jú soleiðis, at framsóknarfrælsið verður útinnt undir ábyrgd fyri revsilógini og lógini um fjølmiðlaábyrgd, sum verja fyri ærumeiðing. Tað er hetta, sum andaligu leiðararnir í muslimska heiminum ikki skilja. Í teimum muslimsku londum, har øsingin um tekningarnar er størst, finst einki pressufrælsi. Har avger stjórnin einsamøll, hvat ið skal vera loyvt at seta á prent ella varpa út. Tað er tí fyri ein stóran part trótandi vitan um okkara norðurlendska fólkaræði, sum gevur gróðrarbotn fyri hesi øsingini. Men sjálvandi eru tað onnur viðurskifti, ið mynda bakstøðið fyri hesi øsing, sum hevur tikið vinnulív og stjórnir í Norðurlondum á bóli. Hesi viðurskifti hava nakað at gera við innanríkispolitiskar trupulleikar í ávísum arabiskum londum.

Øsingin hevur givið vinnufyritøkum í Danmark og Noregi stórar trupulleikar, og hetta ger so spurningin um leiklutin hjá stjórnunum aktuellan. Skal ein stjórn í einum demokratiskum landi biðja um fyrigeving fyri, at eitt blað undir verju av pressufrælsinum viljað ella óviljað kemur til at fornerma eitt trúarsamfelag, sum fevnir um meira enn ein milliard og sum sasmtundis er týðandi marknaður? Ella sagt meira kontant: skal ein demokratisk stjórn seta pressufræslið til viks fyri at bjarga ordrum og arbeiðsplássum? Ja, sigur vinnan – nei siga pressan og demokratar flestir. Hetta er ikki so einfalt, sum tað tykist. Og hetta er helst orsøkin til, at forsætisráðharrin ikki gav umbering men bert harmaðist um, at hundraðtals milliónir av muslimum vóru firtin av Muhammedstekningnum.

Forsætisráðharrin hevur tí einki val. Hann kann ikki geva umbering, uttan at gera seg inn á grundleggjandi fortreytir fyri aldargomulm donskum fólkaræði. Tískil kann hann bert harmast. Danmark er vorðið eitt multietniskt og multimentanarligt samfelag. Hetta krevur, at allir partar sýna virðing hvør móti øðrum í øllum viðurskiftum. Gera danir ikki tað og gera etniskir bólkar og trúarsamfeløg ikki tað, so gongur tað galið. Tað kann ganga heilt galið sum t.d. á Balkan. Hetta gongu báðar sjálvsagt vegir. Nýdanir ella innflytarar mugu eisini skilja, at danir hava nøkur virði, sum eru so grundleggjandi, at missa danir hesi, so er Danmark fokið sum fólkaræði. Her hava allir myndugleikar, stovnar og pressan eina stóra uppgávu nevniliga at fáa allar partar at skilja, at eitt multietniskt og multimentanarligt samfelag setir onnur og nýggj krøv til upprunaborgarar, nýdanir, skúla, myndugleikar og fjølmiðlar. Hetta er eingin lættur setningur, men jú longur bíðað verður við at greiða hann, jú truplari verður uppgávan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vælkomið tolsemistiltak



JOHN JOHANNESSEN
Tinglimur fyri Javnaðarflokkin

**Skulu vit virða hvønn annan ella harta hvønn annan? Hetta tykist vera eina av høvuðsspurningunum í dagsins samfelag. Tí er tolsemistiltakið, sum fólk úr listaheiminum skipa fyri leygardagin, harðliga tiltrongt. Vónandi nýtir hvør einstakur høvið vera við í skrúðgonguni og harvið stuðla upp undir føroyska tolsemið.**

Hvat er hent við okkum føroyingum? Hóast happingarmentanin hevur blómað í Føroyum frá gamlari tíð gjøgnum tættir, skipsrukkur og bygdarfrell, so hava vit hóast alt góðtikið og virt hvønn annan nøkulunda. Men nú er vorðið galið. Nú kanst tú ikki kalla teg rættan mann, um tú ikki gongur á odda í at niðra og enntá útihýsa fólki úr samfelagnum.

Politikarar eru teir, sum hava verið fremstir at innført nýggja rákið. Dugi ikki at finna aðra orsøk fyri hesum enn eitt slag av politiskum máttloysi og ómegd. Tað er jú lættari at brúka orkuna uppá niðran og afturfyri sleppa í fokus, heldur enn at brúka nógva orku og stríð uppá torgreidd samfelagsviðurskifti og kanska onga umtalu fáa.

**Trupulleiki í Javnaðarflokkinum**

Tíverri sær tað út til, at støðan hevur ment seg til at gerast mest álvarsom í mínum egna flokki. Her er visjón 2015 vorðin til visjón 1715, og einstakur tinglimur sær tað sum sítt fremsta mál at útihýsa fólki frá arbeiðsmarknaðinum orsakað av kynsligum samleika.

At nokta fólki livibreyð er sjálvsagt beint tvørturímóti øllum aðalmálum í alheims javnaðarhugsjónini. At beinleiðis niðra samfelagsbólkar er somuleiðis í stórari andsøgn til javnaðarhugsjónina. Og tískil eiga slík sjónarmiðð á ongan hátt at fáa rúmd í einum javnaðarflokki.

Tí var tað er fegnast um, at starvsnevndin í Javnaðarflokkinum alment boðaði frá, at Javnaðarflokkurin er ímóti slíkum sjónarmiðum og tvørturímóti heldur, at rúm skal vera fyri øllum í landi okkara. Tískil er almenna støðan hjá Javnaðarflokkinum júst í tráð við tolsemistiltakið.

Men tess meira serstakliga harmiligt og ódámligt var tað, at hesi sami tingmaður í staðin fyri at taka átalu floksins til eftirtektar, heldur valdi at standa við sínar útsagnir og alment niðra álitisfólk í sínum egna flokki.

Sjálvsagt skal vera vítt til veggja og høgt til loftið í Javnaðarflokkinum eins væl og aðrastaðni. Men slíkur harðrendur atburður ímóti næstanum eigur á ongan hátt at koma fyri.

Tolsemistiltakið er júst í tráð við nýggju starvsnevndarsamtyktina hjá Javnaðarflokkinum. Tískil skal tað vera mín vón, at ikki minst fólk úr okkara flokki fara at stuðla frálíka tiltakinum.

**2015 ella 1715**

Poul Michelsen, løgtingsmaður, førdi herfyri fram, at stendur hendan gongdin við, er lítið virði í at halda fram við tosinum um, at Føroyar skulu vera millum heimsins bestu lond í 2015. Hesum eri eg púra samdur við honum í. Tað er lítil møguleiki at náa málinum, um ikki allir borgarar í samfelagnum hava møguleikan at vera við.

Hjá mær sum politikara og sum javnaðarmanni er tað eitt aðalmál – ella rættari ein skylda at arbeiða fyri einum samfelag, har tað er pláss fyri øllum. Einum samfelag, har tað er pláss fyri tær, óansæð sosialan status, húðalit ella kynsligan samleika. Eitt samfelag, har frælsi, javnaður og brøðralag eru í hásæti.

Menniskju skulu hava frælsi at skapa sær eitt gott lív út frá egnum fortreytum og evnum. Men frælsið er bert veruligt, um tað er fyri øll. Tí hava vit skyldu at tryggja frælsi fyri øll gjøgnum brøðralagið. Øll eiga rættin til eitt gott lív í felagsskapinum. Ikki bert nøkur fá, ikki bert meirilutin, men øll. Onki minni enn øll.

Tað er ymiskleikin – tað serstaka við tí einstaka – ið skapar eitt samfelag. Tí eiga vit at virða ymiskleikan og verja hann.

# Borgarafundur um fasta sambandið

**Mikukvøldið verður borgarafundur í Ósaskúlanum í Klaksvík, har framtíðin hjá Norðoyggjum við fasta sambandinum verður viðgjørd**

SAMFERÐSLA
*Tíðindaskriv*

Í allar tíðir hevur hav skilt Norðoyggjar frá meginøkinum, men við áræði frá leiðandi fólkum og við hjálp frá nýggjari tøkni, standa vit á gáttini til eina tað størstu hending í norðoyasøgu – nevniliga at tað verður koyrandi undir Leirvíksfirði.

Hetta síggja vit øll fram til, tí vit vita, hvussu stóran týdning tað hevur við góðum og jøvnum sambandi. Tað er eingin ivi um, at henda íløga fer at skapa vøkstur og trivna og at vit sum borgarar fara at fáa stóra gleði hava hesum frambroti.

Eitt tað fyrsta sum vit fara at leggja til merkis, verður økta ferðslan, og tí verður kallað inn til borgarafund í Ósaskúlanum mikukvøldið 8. februar 2006 kl. 19.00.

Skulu vit á nakran hátt gera tað liviligt fyri okkum sjálvi og teir gestir, sum koma hendan vegin, so er umráðandi, at vit viðgera hetta evni og væl og virðiliga. Ein spurningur er parkeringsviðurskiftir, ein annar hvussu man fær ferðsluna at glíða, men tann størsti er kanska ferðslutrygdin.

Tankin er, at fundurin skal verða uppbyggjandi og gevandi og skal hann verða ein stuðul til tey sum skulu taka avgerðir.

Tey sum luttaka eru:
Klaksvíkar Kommunu
Ráði fyri Ferðslutrygd
Løgregluna
Ambulansutænastuna
Sløkkiliðið
Landsverk
Norðoyatunnilin
Hvannasunds Kommuna
Viðareiðis Kommuna
Kunoyar Kommuna

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.